# Skemt í SMS og í Leikalund

NÝGGJAR BØKUR



óli P signerar á heimavølli, í Leikalund í Klaksvík

Mynd: Bárður Lydersen

Høvundar og útgevarar hava úr at gera undan jólum at signera bøkur kring landið. Tað varð so eisini luturin hjá Óla Petersen, teknara undan jólum. Leygardagin var hann á heimabeiti og signeraði bøkur. Óli, sum sjálvur er føddur og uppvaksin í Klaksvík, signeraði nýggju Skemt 03 bókina í Leikalund í Klaksvík. Mong leitaðu sær innar at ogna sær hesa 15. bókina í røðini og fyri at hitta teknaran. Í farnu viku var hann eisini í Bókabúðini í SMS og signeraði bøkur. Skuldi onkur ynskt at ogna sær hesa seinastu og tær undanfarnu Skemt-bøkurnar, signeraðar, ber til at venda sær til Sosialin.

Óli Petersen signerar bøkur í Leikalund. Mynd Bárður Lydersen

15 ára eru millum hesar myndir. Tann fyrra varð tikin í 89, tá fyrsta Skemtbókin kom út, tann seinna er tikin í farnu viku, tá 15. Skemtbókin kom á marknaðin. Óli P og Kári Árting í SMS. Mynd Jan Müller





15 ár eru millum hesum myndir. Tann fyrr var tikin í SMS, tá fyrsta Skemtbókin kom út í 89, og tann seinna aftur í SMS, tá 15. bókin kom út. Vit síggja teknaran saman við Kára Árting

# Enniberg TN-180 Tórshavn

Hesin fiskigigantur – kappingarneyti við Sundaberg – og nýggja "Skálaberg" – norði í Klaksvík – er ein veldigur luxus fiskitrolari. Nógv skal til at fylla teir – og manningin skal hava sína løn fyri tær súru – líkasovæl sum tær góðu løturnar.

Enniberg er smíðaður í Bergen, Noregi.
Byggiárið er 1990
Eigari: P/F Enniberg
Útgerðarmaður: Hildigunn Johannesen, Tórshavn

Tekning & ummæli: Jógvan Háfjall

(Sosialurin fer at prenta gamlar sum nýggjar tekningar av føroyskum fiskiskipum. Um onkur lesari ynskir at ogna sær tekning kann hann venda sær til Jógvan Háfjall, telf. 310345)






Fyrireiking til 2. útbjóðing:

# Varisligur áhugi fyri útveljan

**Okkurt nýtt og risastórt oljufelag við**

OLJULEITING

*Jan Müller*

Mánadagin 15. desember var freistin úti at nominera, velja út nýggj øki til oljuleiting á føroyska landgrunninum. Sigurd í Jákupsstovu, stjóri á Jarðfrøðissavninum, sum tekur sær av málinum í fyrstu atløgu sigur, at teir hava fingið 5 formellar nominatiónir, tvs. har feløg skrivliga hava peikað á øki, sum tey halda vera áhugaverd at taka við í eina 2. Útbjóðing á landgrunninum. Haraftrat hava tey fingið tríggjar munnligar fyrispurningar ella havt sokallaðar óformellar samrøður við nøkur feløg, har hesi kortini bæði beinleiðis og óbeinleiðis hava peikað á øki, sum tey halda vera áhugaverd. Sigurd í Jákupsstovu vil ikki siga, hvørji feløgini eru, men viðgongur, at talan er um feløg, sum eru virkin her longu og feløg, sum ikki eru her.

Hann vil ikki gera nakra viðmerking til, um hetta er eitt gott ella ringt úrslit men vísir á, at vit eiga ikki at taka nominatiónina sum nakað endaligt, tí fyri tað um feløg ikki vísa á øki í hesum umfarinum, so kunnu tey væl bjóða, tá sjálv útbjóðingin verður.

Jarðfrøðissavnið hevði gjørt eina meting av økjum, sum kunnu vera áhugaverd, og henda metingin líkist nógv tí, sum feløgini hava víst áhuga fyri. Men haraftrat eru onkur onnur nýggj øki, sum okkurt felag hevur víst á og sum kanska yvirraskar eitt sindur. Økini, sum feløgini vísa á, eru í høvuðsheitum norðan fyri og fram við markinum, eisini longur inni á landgrunninum og fevna tey um eitt rættiliga stórt øki.

Sigurd í Jákupsstovu sigur, at teir vistu ikki, hvussu stórur áhugi fór at verða fyri nominatiónini. Teir høvdu sjálvandi vónað, at tey feløgini, sum eru í Føroyum, fóru at velja út øki, men tað eru verri enn so øll, sum hava gjørt tað. Men mong feløg hava vent sær til Jarðfrøðissavnið og sagt frá, hví tey ikki hava nominerað. Orsøkin er í flestu førum tann, at tey hava ikki uppdaterað tað regionala arbeiðið, sum lá til grund fyri fyrstu útbjóðing. Tí sóu tey seg ikki før fyri at gera eina veruliga nominering nú. Tey gera vart vit, at fyri tað, at tey ikki hava nominerað, so merkir tað ikki, at tey ikki verða við tá avtornar.

- Hetta er eitt frontierøki tvs. liggur fjarskotið og er lutvíst ókent. Tí verða tað tey stóru feløgini, sum koma at dríva verkið. Tá hesi eru við er eisini møguleika hjá teimum meðalstóru og minni feløgunum, at hekta seg uppí.

Nú verður so farið at gera eitt tilmæli til Oljumálaráðið. Ætlanin er fara í tingið í vár við uppskoti til útbjóðingina. Síðani verður útbjóðing latin upp í summar. Umsóknirnar skulu so latast inn í heyst og loyvini verða latin um ársskiftið næsta ár.

Sosialurin veit frá keldum, at helst verður tað risastóra oljufelagið, Chevron-Texaco við í nominatiónini. Hetta telist millum heimsins størstu oljufeløg og hevur fleiri leitiloyvi á bretskum øki tætt upp at føroyska markinum. So hugsast kann, at felagið hevur ein áhuga í at vera báðumegin markið, tá tað í framtíðini fer at bora.



*Sigurd í Jákupsstovu, stjóri á Jarðfrøðissavninum, heldur áhugan vera hampuliga góðan*

*Mynd Maria Olsen*




*Svørtu pílarnir eru okkara skot uppá tey økini, sum oljufeløgini hava nominerað og sum helst verða leitiøkini í 2. Útbjóðing. Áhugavert er at merkja sær, at risastóra oljufelagið ChevronTexaco hevur fleiri av blokkunum beint hinumegin markið og at tað ljóðar, at hetta felagið møguliga er við í føroysku nominatiónini*